# Føroysku tølini tala fyri seg

Tíðin er komin til at bróta upp um armar og fara til arbeiðis. Tøl frá grannalondum okkara vísa, at miðvíst arbeiði ímóti ferðsluóhappum og vanlukkum fáa tølini at lækka. Tann 19. januar skipar Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri ráðstevnu, har ferðslutrygdin verður sett undir sjóneykuna

Ferðslutrygd

- Føroyar halta langt aftan fyri hini Norðurlondini, tá ið ræður um ferðslutrygd og ferðsluvanlukkur, tí skipa vit fyri hesari ráðstevnuni, sigur forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Rúna Sivertsen, nú ráðið skjótt hevur 30 ár á baki. Tað er á sjálvum tríati ára degnum, at ein ráðstevna um størri ferðslutrygd verður í Norðurlandahúsinum.

Málbólkurin til ráðstevnuna eru fólk, sum hava ábygdina av ferðslutrygdini í Føroyum í breiðum týdningi. Tað vil siga politikarar, embætisfólk hjá landi og kommunum, eitt nú tekniskar umsitingar, fólk sum arbeiða við býar- og bygdarplanlegging, fólk sum arbeiða við vegagerð og so framvegis. Onnur sum hava áhuga fyri ferðslupolitikki, eru sjálvandi eisini vælkomin



Rúna Sivertsen, forkvinna í Ferðslutrygd, hevur verið nógv frammi í fjølmiðlunum seinastu tíðina, har hon hevur fýlst á, at innan nýggjar verkætlanir verður í alt ov stóran mun hugsað um nyttu og kostnað, meðan ferðslutrygdin ikki verður raðfest nóg ovarlaga

- Endamálið er, at øll skulu fara útaftur frá ráðstevnuni og hugsa um, hvussu tey hvør í sær á hvør sínum øki kunnu gera sítt til, at ferðslutrygdin verður sett í hásæti og ikki minst – hvussu tey kunnu samstarva, sigur Rúna Sivertsen.

Forkvinnan í Ferðslutrygd hevur verið nógv frammi í fjølmiðlunum í seinastuni, har hon hevur fýlst á, at innan nýggjar verkætlanir verður í alt ov stóran mun hugsað um nyttu og kostnað, meðan ferðslutrygdin ikki verður raðfest nóg ovarlaga.

Hon sigur, at øll grannalondini kring Føroyar hava stungið út í kortið eina ætlan um, hvussu kann gerast fyri tálma høgu tølunum í ferðsluóhappum og vanlukkum. Hesar ætlanir hava eisini virkað sambært tølunum hjá grannalondunum, greiðir Rúna Sivertsen frá.

- Tað sást aftur í tølunum hjá okkum í Føroyum, at ferðslutrygdin ikki verður tikin í nóg stórum álvara, sigur ein sera bersøgin forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Hvørt ár fáa millum 60-80 føroyingar til skaða í ferðsluni, sum prosentvíst er nógv hægri enn í grannalondum okkara.

Í tíðarskeiðinum 1997 - 2004 doyðu 31 í ferðsluni í Føroyum. Tvey børn millum 0-14 ár, 17 ung millum 15 - 24 ár, átta vaksin millum 26 - 65 ár og fýra eldri fólk yvir 65 ár.

Fjølbroytt skrá

Ráðstevnan byrjar við, at Rúna Sivertsen býður vælkomin. Stevnan verður sett av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni. So byrjar sjálv ráðstevnan, har eitt nú fyrilestur verður um, hvussu ferðslutrygdin verður sett í hásæti, tá bæði minni og størri verkætlanir skulu gerast – bæði innan- og uttan fyri bygt øki. Stjórin fyri Ráðnum fyri Ferðslutrygd í Danmark, René La Cour Sell fer at tosa um nýggju skipanina við klippikoyrikortunum, sum fyri stuttum varð tikin í nýtslu í Danmark. Eyðun Andreassen, professari fer eisini at halda ein fyrilestur undir heitinum: Ferðslumentan er meira enn bara ferðslumentan. Sunnrid Traðará, politistur, sum sjálv hevur mist eitt barn í ferðsluvanlukku, fer at tosa um, hví lógararbeiðið er so týdningarmikið, tá vit tosa um ferðslutrygd. Umframt hesi verða onnur viðurskifti eisini á dagskránni og eitt kjak undir heitinum: Hvat nú? Tos ella álvaratos, sum Óluva Zachariassen fer at standa fyri.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur sett Nullhugsjónina frammaliga á dagskránna við ráðstevnuni, sum verður tann 19. januar. Ráðið skipar fyri ráðstevnuni í samstarvi við felagið Synergi. Á heimasíðuni hjá Synergi ber til at síggja alla skránna fyri ráðstevnuna og at tekna seg. Heimasíðan hjá Synergi er: www.synergi.fo.


## Vilt tú verða við til vøkstur og menning?

TRYGD er eitt tryggingarfelag í vøkstri, og fyri at styrkja tænastuliðið, søkja vit eftir ungum søluráðgeva.

**Hvør ert tú?**
Í TRYGD leggja vit størsta dentin á persónligar eginleikar og hugburðin hjá tí einstaka starvsfólkinum. Harnæst koma bókligu útbúgvingarnar og fakligi førleikin.

**Søluráðgevi**
- Tú hevur júst lokið ella ert í holt við seinasta partin av einari miðnámsútbúgving
- Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú kanst samstarva og taka ábyrgd
- Tú ert í bestu árum, ert fyrikomandi og hevur lætt við at seta teg í samband við fólk
- Tú ert málsøkin og opin fyri broytingum
- Tú arbeiðir skjótt, skipað og torir at taka avgerðir
- Tú hevur dyggan handilsligan sans og hevur eitt munagott tænastu sinni

**Vit bjóða**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðingarnar eru nógvar. Høvið er sjálvsagt fyri framhaldandi, persónligari, eins væl og fakligari menning í einum livandi umhvørvi.

Sum starvsfólk í TRYGD, verður tú partur av áhaldandi menningini av felagnum og tær persónligu dygdir, ið tú hevur við tær inn í felagið, koma at gera sítt til at TRYGD gerst enn sterkari. Starvið verður sett og lønt eftir serstøkum sáttmála. Arbeiðstíðin er yrkadagar, millum kl. 16.00 og 22.00

**Umsóknir og starvsseting**
Starvið ynskjast sett skjótast tilber, men vit eru eisini sinnað at bíða eftir rætta viðkomandi. Skrivlig umsókn, við curriculum vitae og tilhoyrandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan 15. januar 2006, skal sendast til:

P/F TRYGD
Att.: Ali Celebi
Gongin 7
Postboks 44
110 Tórshavn
Teldupostur: ace@trygd.fo

Trygd · Gongin 7 · Postboks 44 · FO - 110 Tórshavn · Tel. +298 35 81 00 · Fax +298 31 72 11
www.trygd.fo

TRYGD


# Ejdesgaard ættin á prent

Tíðindaskriv

Í 1998 tók Leivur Ejdesgaard (1930-2000) úr Oyndarfirði, sonur Jústinus Ejdesgaard, abbasonur Andrias Ejdesgaaard og langabbasonur Jákup í Garði á Eiði stig til eina ættarveislu á Kambsdali í Fuglafirði har góð 800 fólk, sum antin eru beinleiðis ættaður úr Garði á Eiði, ella sum eru gift við fólki úr Garði, savnaðust. Í allarfagrasta summarveðri nutu hesi fólk eina løtu saman við eini sterkari kenslu av at hoyra til og vera partur av eini stórari familju. Ætlanin var, at henda ættartalva skuldi vera klár longu tá sum prentlutur, hon hekk uppi undir veisluni, so fólk kundi fylgja við.

Arbeiðið við útgávuni kom í drag og nú eru seinastu súðirnar syftar, ættartalvan er veruleiki. Kanska verður hon dagført um nøkur ár og kanska hittist familjan aftur, tað velst um ny´ggjar kreftir, yngri í ættarliðnum vilja taka stig og nýta kreftir. Nú er grundarlagið lagt og tað eigur ikki at vera stóri kunsturin hjá komandi ættarliðum at førta hetta víðari, soleiðis at í dag ófødd av hesi ætt, einaferð eiga pláss í ættartalvuni.

Ættartalvan kostar 375 krónur, er at fáa í teimum stóru bókabúðunum og annars fæst hon við at venda sær til Bodil Ejdesgaard í Oyndarfirði. Hon er at hitta á telefon 444504 ella 447330.